## Skrá

**Fríggjakvøld**
**30. januar**
**Kl. 22.00**
Tórskjallarin
Vágsbótnur South African Jazzband

**Leygardag**
**31. januar**
**Kl. 11.30-12.00**
HAVNAR KIRKJA
Gudmund Mortensen
Kristian Blak & Mikael Blak

**Kl. 15.00-16.00**
Tutl á Káta Horninum
Kapkass & the Poulsens

**Kl. 16.30-18.00**
Miðlahúsið
Katla

**Kl. 18.00-18.30**
Miðlahúsið
Yggdrasil

**Kl. 18.30-19.15**
Miðlahúsið
Dreymaspøl

**Kl. 19.15-20.00**
Reinsaríið
Birgir Enni kokkur
Ljóð og myndainstallatión: Heðin-Kristian-Nunns

**Kl. 20.00-20.45**
Reinsaríið
Isina

**Kl. 20.45-21.45**
Reinsaríið
Tjant

**Kl. 21.45-22.30**
Reinsaríið
Kapkass & the Poulsens

**Kl. 22.30-23.00**
Reinsaríið
Vágsbótnur South African Jazzband

**Kl. 23.00**
Jam Session

Atgongumerki til Tórskjallarin: 50 kr

Atgongumerki til Miðlahúsið: 100 kr

Atgongumerki til konsertirnar í Reinsarínum: 150 kr. Íroknað er tá okkurt til matna. Birgir Enni er kokkur

**Luttakandi bólkar:**
Tjant
Isina v/ Katrina Petersen
Kapkass & the Poulsens
Vágsbótnur South African Jazzband
Gudmund Mortensen
Dreymaspøl
Yggdrasil
Katla



Tórshavnar Kirkja er eisini við á festivalinum

# Hans Jacob Kollslíð og Kári Sverrisson við bólki

Hans Jacob Kollslíð og Kári Sverrisson, ið góvu fløguna "Dreymaspøl" út stutt fyri jól, verða eisini at hoyra henda leygardagin. Saman við Óla Olsen, Brandi Jacobsen og Mikael Blak, ið spæla við á fløguni, og Heðini Ziska Davidsen fara teir at framføra eitt úrval av løgum av fløguni. Hetta eru løg, teir hava gjørt saman og hvør sær til yrkingar hjá Hans Jacob Kollslíð, Christiani Matras og yrkjarunum Li Po, Wang Wei og øðrum úr sonevndu T'ang tíðini í Kina, ið var fyri eini 1200 árum síðani. Framførslan hjá Hans Jacob, Kára og bólkinum verður í Miðlahúsinum umleið klokkan 18.



# ISINA

Bólkurin "Isina" vid Donsk/Føroysku songkvinnuni Katrinu Petersen á odda tekur støði í fólkatónleiki, ið fyri tað mesta stava úr Svøríki og Bulgaria.
Katrina Petersen hevur í mong ár fingið íblástur úr fólkatónleikinum, serliga tí Bulgarska, sum við sínum skeivu taktum, hvassa klangi og vakra lagið geva eina heilt serstaka uppliving. Afturat sær hevur Katrina nakrar av Føroya bestu improvisatorum.

**Manningin:**
Angelika Nielsen, violin
Leivur Thomsen, guitar
Mikael Blak, kontrabass
Rógvi á Rógvu, trummur

# KapKass and the Poulsens



Herfyri fóru fýra unglingar undir at stovna eina jazz-kvartett. Eftir at hava gingið á musikkskúlum og spælt saman í ymsum samanhangum, eitt nú Tórshavnar Stórbandi í fleiri ár, var tíðin komin til at fara eitt stig víðari. Endamálið var at spæla málrættaðan jazztónleik, soleiðis at tað ikki altíð bert var ein jam-session, har tónleikararnir møttu upp og "jamma", men har tað varð arbeitt meiri miðvíst við tilfarinum. Fyribils eru løgini lænt frá gomlum og kendum jazztónleikarum, men ætlanin er seinni at borðreiða við egnum løgum.

**Manningin:**
Konni Kass Jacobsen, vokal og sax
Mattias Kapnas, klaver
Bárður R. Poulsen, kontrabass
Jan Rúni Poulsen, trummur